# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Átrúnaður og politikkur

Fólkaræðið byggir á meginreglurnar um rættin til frítt at tala, hugsa, trúgva og frítt at velja politiska valdið við frælsum og loyniligum valum. Okkara vesturlendska fólkaræði byggir hartil á alment galdandi kristin grundvirði. Átrúnaður og politikkur eru ein sera vandamikil blanding. Hetta hava vit óteljandi dømi um í søguni. Hvussu nógv kríggj, harðskapur og kúgan hava ikki staðist av, at átrúnaður og politikkur eru vorðin blandað saman. Vit kunnu bert minna á tey stóru átrúnaðarkríggini, sum komu í kjalarvørrinum á trúbótini, vit kunnu minna á ta ræðuligu viðferð sum eitt nú upprunatjóðirnar í Amerika fingu, har tey vórðu kúgað við halgubók í aðrari hond og svøri í hinari. Vit kunnu minna á lagnu armenska fólksins, á Norðurírland og síðst men ikki minst skuldi verið óneyðugt at mint á ræðuleikarnar á Balkan, sum hendu fyri bert heilt fáum árum síðani og so ikki at forgloyma muslimska fundamentaismu, sum hóttir ein stóran part av vesturheiminum.

Tað stendur einum og hvørjum frítt at stovna politiskar flokkar á eitt nú kristnum støði, men tað er bæði ósakligt og ókristiligt at lýsa politiskar flokkar, sum byggja á vanligar demokratiskar meginreglur sum ókristiligar ella tað, sum verri er. Átrúnaður er ein privat søk, og tað er ikki sameiniligt við okkara alment galdandi demokratisku grundsjónarmið, at politiska yvirvøldin skal taka sær rætt til at gera av, hvat borgarin skal trúgva. Hetta er ein søk millum borgaran og Gud. Seinastu árini hava vit sæð eitt vaksandi rák, har kristindómurin verður politiseraður. Vit møta alt meira harðmæltum krøvum um, at lóggávan skal gerast bíbilsk. Hvat merkir hetta? Skulu vit við øðrum orðum skifta okkara lóggávu, sum byggir á upplýsing, demokratiska heimspeki og vanlig kristiliga lívsáskoðan um við eitt nú Móselógina. Tað er væl eingin, sum í ramasta álvara gongur við slíkum ætlanum í Føroyum.

Hinvegin tykjast tey, sum stuðla teimum, sum taka sær rætt til at politisera kristindómin, ikki at vanda sær um atburð ella val av miðlum, tá tað ræður um at vinna politiskt vald og sverta teir flokkar, sum ikki verða mettir kristiligir. Vit vita ikki, hvør, ið hevur sent postkortið, sum øll føroysk húski hava fingið, og sum býtir flokkar upp í kristiligar og ókristiligar. Vit ákæra tí ongan fyri hesa ósømiligu og ókristiligu gerð. Men uttan mun til, hvør, ið hevur ábyrgdina, er hetta eitt dømi um, hvussu ódámlig samanblandingin av átrúnaði og politikki er.

**Sosialurin**

# Far heim, Sofus Clementsen!

**SÍÐULINJAN**
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



Eg fari ikki at øsa meg um, at onkur føroyingur ger eina talvu, sum skal illustrera, hvussu kristiligir teir føroysku flokkarnir eru. Annað kunnu vit ikki vænta í Føroyum. Kanska er talan um ein forstýraðan fanatikara. Kanska um ein borgara, sum vil hava eitt sindur av humor inn í valstríðið, og sum spælir hund við Føroya fólki. Hvør veit. Higartil er einans upplýst, at ein privatpersónur stendur aftanfyri, og at ein føroysk fyritøka hevur figgjað.

Innihaldið á lepanum øsir meg heldur ikki. Men tað, sum øsir meg, er Postverk Føroya, sum ber eitt slíkt pappír út í hvørt heim í Føroyum miðskeiðis í einum valstríði. Tað, sum øsir meg, er ein totalt ábyrgdarleysur stjóri, Sofus Clementsen at navni, sum á Rás 2 í gjár ikki tók frástøðu frá tilburðinum og ikki so mikið sum viðurkendi, at Postverkið hevur gjørt ein fatalan brølara.

Í staðin borðreiddi hann við eini jánkasligari útsøgn um, at "vit í framtíðini fara at endurskoða mannagongdirnar á økinum", og at "vit ikki hava nakað fordømi". Og tað, sum eisini øsir meg, er, at advokaturin hjá Postverkinum seinni í gjár rættvísgjørdi ein tilburð, sum er moralskt forkastiligur. Um eingin paragraff í viðkomandi lóg inniheldur greið krøv um, at slíkt tilfar SKAL hava ein avsendara, ja, so hava vit eitt stórt hol í lógini, sum má endurskoðast sum skjótast.

Eg eri ikki lógkønur og fari tí heldur ikki at meta um § 14 í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001, har tað stendur, at Postverkið ikki skal bera út tilfar, sum er "ólógligt, ósømiligt ella æruskemmandi", hóast eg ikki ivist í, at nógvir føroyingar meta tað vera bæði ósømiligt og æruskemmandi, at Postverkið ber út eitt pappír, sum bólkar flokkar og veljarar átrúnaðarliga. Sum um tað finst ein útgáva av kristindóminum. Men eg loyvi mær at gera ta niðurstøðu, at tá Postverkið fyrst ber út í hvørt heim slíkt tilfar og síðani noktar at upplýsa avsendara og ta fyritøku, sum rindar, og tað enntá mitt í einum valstríði, so hevur Postverkið mist alla etiska ábyrgdarkenslu.

Hvør er prinsipiella avleiðingin av hesum? Jú, hon er, at eg í morgin kann fáa Postverkið at bera mær ein faldara út, sum t.d. spillir ein flokk ella eitt valevni út, og sum er uttan avsendara. Niðurstøðan er, at nú kunnu fólk og dólgar í kardumummubýnum frítt fáa Postverkið at bera alskyns tvætl út í hvørt heim í Føroyum, uttan at nakar avsendari verður upplýstur. Hetta er sama orsøk til, at bløðini loksins blakaðu dulnevndu lesarabrøvini á øskudungan. Postverkið skuldi tikið við læru frá bløðunum.

Eg leggi lítið í juridisku frágreiðingina hjá løgfrøðinginum hjá Postverkinum, sum sigur, at Postverkið ikki hevur ábyrgd av, at navn skal kunna setast á avsendara. Hetta er og verður moralskt forkastiligt og birtir upp undir eitt skrivi- og talufrælsi, har avstumpaðir ræðuskítar stórtrívast.

Fortreytin fyri allari konstruktivari kjakmentan er, at vit vita, hvør tosar, skrivar ella á annan hátt ber sín boðskap fram, so vit kunnu plasera ábyrgdina og atfinningarnar, um vit hava nakrar. Men tað meta Sofus Clementsen og løgfrøðingur hansara ikki. Og tí haldi eg tað vera best, at Sofus fer heim at leggja seg eina løtu.

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.